# Hálvtannaðhundrað ung svimja um kapp

Í kvøld og allan dagin í morgin verður stór svimjikapping í Fuglafirði. Hetta er árliga FS-Stevnan, sum er í bólkunum 1, 2 og 3 fyri børn í aldrinum upp til 12 ár.

Einir hálvtannaðhundrað svimjarar úr átta feløgum eru við í kappingini, sum byrjar í kvøld klokkan 20.

Serliga frøast fyrireikararnir um, at felagið Reki úr Leirvík, sum ikki hevur verið við í kappingum í mong ár, nú eru komið við aftur.

Hini feløgini, sum eru við, eru Ægir, Flot, Skeggjar, Tvørorar Svimjifelag, Vágs Svimjifelag, Havnar Svimjifelag og Fuglafjarðar Svimjifelag

# Dómarar fáa altjóða avbjóðing

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Støðugt er boð eftir føroysku fótbóltsdómar-unum, tá altjóða dystir skulu dømast í ymsu europeisku kappingunum, og mikudagin skulu fýra teirra avgreiða eina uppgávu í EM-undankappingini fyri U21-lið.

Tá skal Lassin Isaksen døma dyst í Volgograd millum Russland og Albania, og linjudómarar hjá honum verða Jón Kári Frederiksen og Jens Albert Simonsen. Birgir Sondum verður við sum fjórðidómari.

Teir fýra fara úr Føroyum mánadagin og koma aftur hósdagin.

# Todi spældi á eykaliðnum



FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Meðan fyrrverandi liðfelagarnir hjá Toda Jónsson á landsliðnum fyrireika seg til dyst móti Litava í morgin og móti týsku varaheimsmeistarunum mikukvøldið, spældi Todi í fyrrakvøldið á eykaliðnum hjá FCK.

Todi, sum ikki var við, tá FCK um vikuskiftið vann 2-1 á Silkeborg og staðfesti sína oddastøðu í bestu deildini, spældi eykaliðsdyst móti Køge.

FCK vann dystin 5-2, og Todi javnaði til 2-2 níggju minuttir fyri hálvleikssteðgin, umframt at hann legði upp til onkur av hinum málunum.

At føroyski FCK-framherjin er at síggja á eykaliðnum, heldur enn superliguliðnum, kann tykjast sum eitt úrslit av tí vanliga trýstinum, ið verður lagt á Toda, so hann skal skriva undir nýggjan sáttmála við felagið.

Ikki er óvanligt, at spælararnir verða »revsaðir« við plássi á næstbesta liðnum, tá feløgini royna at mýkja støðuna undan avgerandi samráðingum við spælararnar.

# Hoyvíkshøllin fær nýtt tak



*Undan loftinum í spildurnýggju Hoyvíkshøllini lekur, tá tað regnar av ávísum ættum, men nú skal nýtt tak leggjast á fyri kanska eina millión*

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Nýggja ítróttarhøllin í Hoyvík, sum er heimavøllur hjá bæði H71 og KÍF í hondbóltskappingini í vetur, skal longu nú fáa eina umfatandi umvæling.

Hóast høllin stendur í einum 15 milliónum krónum, er takið so mikið ótætt, at kemur regn av ávísum ættum, dryppar niður undan loftinum.

- Vit harmast um, at takið skal vera so illa frágingið ella vánaligt, at tað lekur. Og tá eitt nú bara gólvið í høllini kostar fleiri milliónir, kunnu vit ikki lata hetta um okkum ganga, sigur Heðin Mortensen, formaður í bygginevndini og formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð.

- Hetta hevur verið greitt í eina tíð, men vit vildu hava høllina lidna, so hon kundi takast í brúk. Tó kunnu vit ikki liva við, at tað lekur inni í høllini, so okkurt verður nú gjørt við takið. Og her má berast skjótt at.

Heðin Mortensen nevnir, at tann mest upplagdi møguleikin helst er, at nýtt tak verður lagt oman yvir verandi tak.

- Eg vildi mett, at hetta kostar millum 800.000 og eina millión krónur, men tað má býráðið so bara leggja út, til vit annars hava fingið avgreitt, hvør skal ábyrgdast fyri, at takið ikki er í lagi, sigur hann.

- Metingarfólk hava verið og kannað takið, og nú bíða vit so eftir einari frágreiðing. Men arbeiðið má byrja sum skjótast, so høllin ikki fær skaða. Um tað bara er turt í veðrinum, skuldi borið til at fingið gjørt arbeiðið eftir ikki so langari tíð.

Enn hevur ikki áarføri verið, so tað ótætta takið veruliga er sloppið at standa sína roynd undir dysti, men sunnudagin dryppaði so mikið undan loftinum, at gólvið bleiv turkað í øðrum endanum, meðan álop var í hinum endanum…

# Steypakappingarnar hjá dreingjum og smágentum avgreiddar í morgin

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Nú fótbóltsárið er farið at halla, verða alsamt fleiri av steypakappingunum hjá teimum yngru avgreiddar. Í morgin eru soleiðis kappingarnar hjá bæði dreingjum og smágentum.

Kappingin hjá dreingjum, sum upprunaliga skuldi vera í Vágum, er flutt til høvuðsstaðarøkið og verður spæld í Havn og á Argjum.

Níggju lið eru við, og eru tey koyrd í tríggjar innleiðandi bólkar. Í bólki A spæla B36, KÍ og B68 á ovara vølli í Gundadali, í bólki B spæla VB, B71 og TB á Argjum, og í bólki C spæla HB, NSÍ og ÍF á niðara vølli í Gundadali.

Lagt verður til brots klokkan tíggju á øllum trimum støðunum, og hvør dystur er tvær ferðir eitt korter.

Vinnararnir úr hvørjum bólki koma so í ein finalubólk, sum verður avgreiddur á Argjum.

Hin steypakappingin, sum er tann hjá smágentum, skuldi upprunaliga vera í Vági og Sumba fyri einari viku síðani, men hon verður nú í staðin spæld í morgin í Runavík og á Toftum.

Níggju smágentulið eru við, og spæla tey fyrst í tveimum innleiðandi bólkum. Í bólki a spæla NSÍ, EB/Streymur, HB, VB og B36 í Runavík, og í bólki B spæla KÍ, ÍF, B68 og B71 á Toftum.

Vinnararnir í bólkunum spæla finalu og tey bæði næstfremstu liðini spæla um bronsu. Teir báðir dystirnir verða spældir í Runavík.



UTTAN ÚR HEIMI

# Saddam skal fyri ein krígsbrotsmannadómstól

**USA vil hava irakska forsetan Saddam Hussein drignan fyri ein krígsbrotsmannadómstól**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*



*Saddam Hussein. Amerikanarar vilja hava hann fyri ein krígsbrotsmannadómstól eins og Slobodan Milosevic*

*Mynd: Reuters*

Amerikanski embætismenn siga, at irakski forsetin skal hava somu viðferð sum fyrrverandi jugoslaviski forsetin, Slobodan Milosevic.

Seinastu tíðina hava fleiri spurt, hvat amerikanska stjórnin ætlar at gera við Saddam Hussein, eydnast tað at fáa fatur á honum undir einum møguligum álopi á Irak. Hvørki George W. Bush, forseti ella næstu menn hansara hava viljað svarað spurninginum, men nú verður sagt, at embætismenn í Hvítu Húsunum eru komnir til ta niðurstøðu, at hann skal fyri ein krígsbrotsmannadómstól.

- Hann fær somu viðferð sum Slobo, sigur ein embætismaður í Hvítu Húsunum.

Í krígsbrotsmannadómstólinum í Haag er Slobodan Milosevic ákærdur fyri fólkamorð og brotsverk ímóti mannaættini, og sambært embætismanninum er ætlanin at reisa somu ákærúr ímóti irakska leiðaranum.

Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Ari Fleischer, sigur, at verður Saddam Hussein drigin fyri rættin, verður tað altjóða samfelagið og ikki bara USA, sum skal ákæra hann. Sambært Fleischer skal ein serligur dómstólur skipast til endamálið.

# Danir eiga at kunna atkvøða Danmark út úr ES

Skulu donsku veljararnir á fólkaatkvøðu um eina ES-grundlóg, eiga veljararnir samstundis at fáa høvi til at atkvøða um at taka Danmark burtur úr samveldinum.

Tað heldur formaðurin í Danska Fólkaflokkinum, Pia Kjærsgaard.

- Skulu teir donsku veljararnir eina ferð í tíðini taka støðu til at sleppa teimum fyrivarnum, sum Danmark hevur, og um eina nýggja ES-grundlóg, eiga teir eisini at fáa høvi til at atkvøða fyri at taka Danmark burtur úr samveldinum, sigur Pia Kjærsgaard.

Danski Fólkaflokkurin fer at halda landsfund um vikuskiftið, og hildið verður, at ES verður høvuðsevnið á fundinum. Serliga spurningurin um at geva londunum í Eysturevropa limaskap hevur áhuga hjá flokkinum. Danski Fólkaflokkurin krevur reglur, sum skulu avmarka møguleikarnar hjá fólki í Eysturevropa at leita sær inn á arbeiðsmarknaðin í teimum vesturevropeisku londunum.

- Mær tykir, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri kennir seg tvungnan til at vera vinarligur, nú hann er ES-formaður. Men hann skal taka annað skinn um bak, tí vit kunnu koma í ta støðu, at eysturevropeiskir arbeiðsmenn í hópatali fara at floyma inn yvir danska arbeiðsmarknaðin, og tað fer uttan iva at ávirka arbeiðs- og lønarviðurskiftini hjá teimum donsku løntakarunum tann skeiva vegin, sigur Pia Kjærsgaard.

# Finnland nærkast NATO

**Finski forsetin, Tarja Halonen, avsannar ikki, at Finnland kanska fer at søkja um limaskap í NATO, men hon vil ikki siga, nær tað verður**

FINNLAND
*Árni Joensen*

Tað var í einari samrøðu við portugisiska blaðið Publico, at finski forsetin gloppaði dyrnar fyri NATO.

Tarja Halonen sigur við blaðið, at málið er trupult, men at tað er ikki óhugsandi, at Finnland fer at søkja um limaskap í verjusamgonguni. Hon vil kortini ikki siga nakað um, nær ein umsókn kemur á borðið á NATO-høvuðsskrivstovuni í Bruxelles.

- Dyrnar hjá NATO standa opnar fyri okkum, og ein dag fara vit kanska at biðja um at sleppa innar. Vit eru greið yvir, at samstarv við NATO er neyðugt bæði nú og í framtíðini, sigur finski forsetin.

Síðani seinna heimsbardaga hevur Finnland rikið ein uttanveltaðan uttanríkispolitikk, men síðani Sovjetsamveldið datt sundur, er uttanríkispolitikkurin og trygdarpolitikkurin broyttur nógv. Í 1994 fór Finnland upp í ES.

Í november verður val til finska ríkisdagin, og eygleiðarar halda, at tann komandi stjórnin fer at senda NATO umsókn um limaskap´, sama hvørjir flokkar fara at mynda stjórnina.

# Avstralia stúrir fyri al-Qaeda

Avstralsku myndugleikarnir siga seg hava illgruna um, at ein yvirgangsbólkur hjá felagsskapinum al-Qaeda er í landinum, og at bólkurin bert bíðar eftir boðum um at fremja eina atsókn.

Yvirgangsserfrøðingurin Rohan Gunaratna segði í avstralska útvarpinum í gjár, at tá hann herfyri avhoyrdi tveir limir í al-Qaeda, sum sita fongslaðir í Avstralia, høvdu hesir greitt frá, at ein bólkur hjá felagsskapinum er í Avstralia. Gunaratna heldur, at tveir ella tríggir limir í al-Qaeda ganga leysir onkunstaðni í landinum.

Avstralski forsætisráðharrin, John Howard, segði í gjár, at stjórnin í Canberra hevur ongar upplýsingar, sum benda á, at vandi er fyri yvirgangsatsóknum.

# Eiga at fáa grundlóg

ES eigur at fáa eina rættiliga grundlóg nú, heldur formaðurin í ES-nevndini, italiumaðurin Romano Prodi. Orðini fullu, stutt eftir at hann hevði kunngjørt, hvørji lond fáa limaskap í samveldinum í 2004.

Romano Prodi heldur, at tað er áræði og framskygdum politiskum dirvi fyri at takka, at tað fyrr so sundurbýtta Evropa verður sameinað. Men hendan gongdin krevur eisini, at ES vísir dirvi og framskygni, sigur hann. ES-nevndarformaðurin er av teirri áskoðan, at skal tað nýggja ES festa røtur og búnast, er neyðugt at broyta verandi skipan og bygnað.

Romano Prodi sigur, at grundlógin skal tryggja rættindini hjá borgarunum og lutin hjá teimum einstøku limalondunum. Hon skal eisini varðveita ta fjølbroyttu mentanina í limalondunum og styrkja samhaldsfestið.

# Slapp ikki leysur

Mark David Chapman, sum myrdi John Lennon fyri 22 árum síðani, sleppur ikki úr Attica-fongslinum.

Tann 47 ára gamli Chapman hevði biðið myndugleikarnar um grið, og hann royndi at sannføra teir um, at hann nú kendi seg sum ein lóglýdnan borgara, og at hann hevur ikki sálarligar trupulleikar longur. Men umsókn hansara um grið varð havnað. Myndugleikarnir siga kortini, at hann kann søkja aftur um tvey ár.

Hetta er aðru ferð, at Mark David Chapman, sum nú er 47 ára gamal, hevur biðið um at sleppa úr fongslinum. Fyrru ferð varð umsóknin havnað, tí einkjan eftir John Lennon, Yoko Ono, gjørdi vart við, at hon fór ikki at kenna seg trygga, varð Chapman latin leysur. Hesaferð svaraðu myndugleikarnir, at tað hevði verið skeivt at lata hann leysan, tá hugsað verður um ta álvarssomu brotsgerðina, sum hann varð dømdur fyri.

Mark David Chapman varð dømdur lívlangt fongsul, eftir at hann hevði skotið John Lennon uttan fyri bústað hansara í New York.